# EB/Streymur best í Klaksvík

**FÓTBÓLTUR** Sundalagsmenn vunnu í gjár fyrsta steypið í ár, tá teir endaðu ovastir av teimum fýra liðunum, sum vóru við í árligu útgávuni av Klaksvíkskappingini

Hilmar Jan Hansen



*formaðurin í KÍ, Tummas Lervig, handaði liðformanninum hjá EB/Streymi, steypið*
Mynd: Norðlýsið

Í finaluni møttust tey bæði liðini, ið endaðu ovast í landskappingini í fjør, HB og EB/Streymur, eftir at tey høvdu vunnið hvør sín innleiðandi dyst leygardagin, sum vóru ímóti ávikavist KÍ og NSÍ.

Bara eitt mál kom fyri steðgin í finaluni, og tað skoraði Pætur Dam Jacobsen, so EB/Streymur var á odda 1-0 í hálvleikinum. Síðani javnaði Fróði Benjaminsen fyri HB við brotssparki, áðrenn Bárður Olsen bleiv spældur leysur og smekkaði bóltin í málið til 2-1, ið gjørdist úrslitið av dystinum.

Aftaná kundu so spælararnir hjá EB/Streymi lata seg heiðra mitt á vøllinum í Klaksvík, har formaðurin í KÍ, Tummas Lervig, handaði liðformanninum hjá EB/Streymi, steypið.

Í bronsudystinum stóð á jøvnum 1-1 eftir 90 minuttir, so har mátti brotssparkskapping til, áðrenn ein vinnari kundi kjósast. Einki mál kom í fyrra hálvleiki, men stutt eftir steðgin skoraði Kristoffur Jakobsen til 1-0 fyri KÍ, og tá smáir 20 minuttir vóru eftir, javnaði Christian Høgni Jacobsen fyri NSÍ.

Sostatt máttu brotsspørk skjótast, og her máttu ikki færri enn níggju skjúttar til, áðrenn avgerðin var fallin, og tá endaði tað við, at NSÍ vann 8-7.

### Fleiri brotsspørk

Hetta við brotsspørkum var forrestin eisini lagnan hjá KÍ í innleiðandi dystinum ímóti HB, tí tá stóð eisini á jøvnum eftir vanligu tíðina. Kristoffur Jacobsen og Hjalgrím Eltør løgdu KÍ á odda 2-0, áðrenn fyrst Kári Nielsen minkaði um munin fyri HB og síðani Fróði Benjaminsen javnaði við brotssparki.

Av tí at tveir av spælarunum hjá KÍ brendu síni brotsspørk, meðan allir hjá HB skoraðu, endaði hesin dysturin tískil 6-3 til HB, sum tí kom í finaluna. Annars gott avrik av uppflytaranum, KÍ, at liðið megnaði at halda tveimum av ovastu liðunum í fjør í 90 minuttir og ikki fall, fyrr enn brotsspørkini skuldu skjótast.

Í hinum innleiðandi dystinum spældu EB/Streymur og NSÍ, og her vann EB/Streymur 2-1. Fyrst skoraði Arnbjørn T. Hansen til 1-0 fyri EB/Streym, áðrenn ein av nýggju spælarunum hjá NSÍ, Hugues R. Nanmi, javnaði til 1-1. Sigursmálið hjá EB/Streymi skjeyt Arnar Dam.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Stórsteypadysturin stuðlar CTD-felagið

**FÓTBÓLTUR** Sunnudagin spæla føroyameistararnir í HB og steypavinnararnir í EB/Streymi ársins Stórsteypadyst á ovara vølli í Gundadali. Allur ágóðin frá dystinum, sum Lions Club og Fótbóltssambandið í felag skipa fyri, fer til CTD-felagið

Uni Holm Johannesen

Hetta er fimta árið á rað, at spælt verður um Lions-steypið, sum B36 vann í 2007, NSÍ í 2008 og sum HB vann í bæði 2009 og 2010. Av tí at HB er við aftur hesa ferð, kann felagið vinna steypið triðju ferð á rað, meðan EB/Streymur er við fyri triðju ferð, men enn eigur á at vinna tað. Spælt verður um steypið í 10 ár.

Dysturin, sum verður sunnudagin 27. mars klokkan 16, er fyrsti almenni fótbóltsdysturin í kappingarárinum 2011, og atgongumerkjaprísurin er 80 krónur, sum er vanligi taksturin til dystir í Vodafonedeildini. Ikki er óvanligt, at fólk lata størri upphædd, tí endamálið við Stórsteypadystinum er at útvega pening til eitt vælgerandi endamál.

Fyrireikararnir siga, at í hálvleikinum og eftir dystin er møguleiki at fáa ein kaffimunn í FSF-húsinum, og annars verður sjálvandi steypahandan eftir dystin, har Niels Nattestad, økisformaður í Lions Club í Føroyum, og Christian Andreasen, forseti í Fótbóltssambandinum, handa steyp og heiðursmerki, og eisini verður handaður ágóðin frá dystinum til útvalda endamálið.

### Stuðla CTD-felagið

Tað er Lions Club í Føroyum, sum saman við Fótbóltssambandinum skipar fyri dystinum, og í ár er avgerð tikin um, at allur ágóðin frá Stórsteypadystinum hesa ferð skal fara til CTD-felagið, sum var sett á stovn í desember 2009.

Felagið røkir felags áhugamál hjá berarum av sjúkuni og familjum teirra, og tað verður gjørt við at veita stuðul og seta í verk tiltøk á økjum, sum almenna heilsuverkið ikki fevnir um. Eisini er eitt av endamálunum hjá CTD-felagnum at upplýsa um sjúkuna, sum fyrstu ferð var staðfest í Føroyum í 1995.

CTD, sum er stytting fyri Carnitin Transportør Defekt, er ein sjúka, sum kann arvast frá foreldrum til børn, so tí er ógvuliga umráðandi, at fólk koma at kenna til allar tær fylgjur, hon hevur við sær. Sjúkan er nógv meira útbreidd í Føroyum enn aðrastaðni, so tí stuðlar CTD-felagið eisini vísindaligari gransking av CTD.

*uni@sosialurin.fo*